

KRINGVARP FØROYA

# Ársfrágreiðing
2023

# Kringvarpið
# – pallurin, har allir føroyingar hittast

Vit taka tey mál upp, sum hava týdning fyri teg. Tí eru vit fremsti mentanarberi føroyinga. Endamálið hjá Kringvarpi Føroya er at veita eina public service-tænastu, sum savnar, undirheldur og ríkar.

# Innihald


Formæli 4

Framleiðsla 5

Álit og nýtsla 9

Aktuelt 16

Ítróttur 20

Mentan 24

Átrúnaður 33

Ungdómur 35

Børn 38

Tónleikur 42

SavnsGull 45

Public service 46





**Kringvarp Føroya**
**Ársfrágreiðing 2023**

Forsíðumynd
Bjarni Árting Rubeksen

Myndir
Bjarni Árting Rubeksen
og egnar myndir

Uppseting
Guðrið Syderbø

# Formæli



Mótsetningar merktu árið 2023. Øðrumegin hendu frambrot á serliga talgilda økinum, sum millum annað førdu til, at børnini fingu eitt nýtt og nógv betri tilboð. Hinumegin kom óvissan um fíggjarligu karmarnar á hámarkið í vetur. Lyftið í samgonguskjalinum um at styrkja Kringvarpið var ikki framt í verki. Tí boðaði leiðslan í november frá, at neyðugt var at spara yvir 8 milliónir krónur. Umfatandi sparitiltøkini merktu, at starvsfólkahópurin minkaði við útvið 11 ársverkum. Hetta rakti skránna meint. Sum tað fyrsta steðgaðu fyrireikingarnar til stóru sjónvarpsframleiðslurnar av nýggjárskonsertini og ítróttafagnaðinum, sum skuldu vera í januar í 2024. Landsstýriskvinnan í mentamálum boðaði stutt eftir hetta frá einum lógaruppskoti, sum bøtti um inntøkugrundarlagið hjá Kringvarpinum. Uppsagnirnar í fasta starvsfólkahópinum vórðu tí tiknar aftur. Fráboðaða lógaruppskotið fór tó ikki at geva allar tær inntøkurnar, sum tørvur var á, og tí stóðu flestu sparingarnar í rakstrinum og skránni við.

**Talgildingin skal skapa virðir fyri øll**

Kringvarpið setti ferð á talgildu snaringina í 2023. Yvirskipaða málið er, at alt programmvirksemið skal veita ta bestu talgildu tænastuna til tess at kennast viðkomandi fyri allar bólkar og skapa virðir fyri øll. Hetta er neyðugt fyri at styrkja um kappingarførið í einum miðlaheimi, har stríðið um uppmerksemi alsamt harðnar.

Meginparturin av kritiska undirstøðukervinum undir útvarpinum og sjónvarpinum bleiv tí skift út. Nýggju skipanirnar gera tað møguligt at menna samvirkandi arbeiðsgongdir, sum teingja framleiðslu, skrá, heimasíðu og savn saman.

Nýggja VIT-appin varð almannakunngjørd í juni í 2023. Hon er eitt stórt frambrot á barnaøkinum. Sjónvarpstilfarið er nú lættari atkomuligt á einum palli, sum børnini brúka nógv. Næsta stigið verður at gera útvarpstilfarið atkomuligt. Útlendska tilfarið og enska málið vinna alt meira fram, og tí vóna vit, at tað føroyska tilboðið við appini fer at hava jaliga ávirkan á máltilvitið hjá børnunum.

Hóast ongin public service-sáttmáli hevur verið millum politiska myndugleikan og Kringvarpið, síðani tann seinasti fór úr gildi við ársenda í 2020, hevur Kringvarpið arbeitt, sum um ein sáttmáli var í gildi. Fleiri nýggjar siðmennandi sendingar vóru í útvarpinum í 2023. “Vágskálin” og “Samværi” leggja dent á ávíkavist ummælir og samrøður við listafólk. Í “Vikuni” er kjak um aktuellar hendingar og rák, meðan tað í “Skrivað stendur” verður skift orð um, hvussu aldargomlu tekstirnir í Nýggja Testamenti eru viðkomandi í dag. Røðin “Kulfaktor Føroya” viðgjørdi tann góða býin og ta góðu bygdina. Røðin um føroyskan landbúnað varpaði ljós á stóru broytingarnar, sum hava verið seinastu árini. Ungdómstoymið BIIT nam í røðini “Nert ikki við” við evni á sálarheilsuøkinum í Føroyum, sum vit vanliga ikki tosa um. Millum sjónvarpssendingarnar kunnu vit nevna røðina “Útilív”, sum vendi sær til teirra, sum ætlaðu at ferðast í egnum landi. Dokumentarrrøðin “O, móðurlandið” – sum elvdi til nógv kjak – varpaði ljós á okkara støðu í danska ríkinum. Sendingarnar um bóndahjúnini í Stóru Dímun, sum tveyeini gera alt tað dagliga arbeiðið í oynni, góvu innlit í ein øðrvísi gerandisdag.

Føroysku ítróttafólkini stóðu seg sera væl í 2023. Hetta sást aftur í talinum av sjónvarpsframleiðslum, sum setti met. Kringvarpið sendi 46 ferðir frá ítróttatiltøkum í Føroyum og útlondum.

**Vón um betri karmar**

Kringvarpið setti á ráðstevnuni “Miðlar og fólkaræði” sjóneykuna á neiliga árinið, sum tøknirisarnir hava á mentanina og fólkaræðið. Tað má standa øllum greitt, at tað er ein ovurstórur tørvur á einum sterkum public service-stovni sum Kringvarpið, ið kann framleiða dygdargott tilfar á móðurmálinum, eggja til kjak og hava eftirlit við politisku skipanini. Kringvarpið kann sum ongin annar miðil samansjóva samfelagið. Okkara vón er tí, at lógaruppskotið um broytingar í kringvarpslógini styrkir fíggjarliga grundarlagið undir Kringvarpinum. Eitt styrkt Kringvarp Føroya er betur ført fyri at lyfta uppgávurnar í nýggja public service-sáttmálanum, sum væntandi verður samtyktur í 2024.

Við ynskjum um eitt gott ár fyri Kringvarp Føroya og brúkarar tess.

**Ivan Hentze Niclasen,**
**kringvarpsstjóri**

# Framleiðsla



# Framleiðsluyvirlit

Yvirlitið vísir einans føroyska framleiðslu.
Bólkarnir fevna um hesar sendingar:

**Aktuelt**
Útvarpstíðindi, Dagur og vika, tíðindafundir, stuttdokumentarar og Breddin.

**Tónleikasendingar**
Tónleikasendingar í útvarpi og sjónvarpi, FMA og aðrar konsertir.

**Infotainment**
Orðið er heiti fyri sendingar, ið kunnu bólkast sum bæði "information" og "entertainment". Hesar sendingar eru undir bólkinum Infotainment: Góðan Morgun Føroyar, Vikuskiftið, Ólavsøkuprát, Gekkurin, Summargestir o.l.

**Børn og ung**
Barnaútvarpið, allar barnasendingar í sjónvarpinum, og ungdómssendingar – eitt nú Gentuvesið og aðrar sendingar, sum ungdómstoymið Biit framleiðir.

**Átrúnaður**
Morgunlestrar, andaktir, gudstænastur, møti og sendingarnar Credo og Skrivað stendur.

**Mentan**
Mentanarsendingar, Vikan, siðsøga (t.d. Meg minnist), samrøður, frásagnir (Við Tórði á túri o.l.), náttúrusendingar, dokumentarsendingar, framhaldssøgur, stuttsøgur, tónleikasendingar við samrøðum, ymsar sendingar um høgtíðir o.l.

**Ítróttur**
Ítróttasendingin í útvarpinum í vikuskiftunum, 3-2 í sjónvarpinum, frásagnir frá fótbólti og hondbólti, finalur í hondbólti, flogbólti, fótbólti, svimjing, badminton, borðtennis og judo, landsdystir í fótbólti og onnur føroysk luttøka í altjóða kappingum.

**Sendingar, sum falla uttan fyri bólkingina**
Tingvarpið í sjónvarpinum.

| Bólkar | Útvarp | Sjónvarp | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Aktuelt | 787 | 122 | 909 |
| Tónleikasendingar | 4.525 | 30 | 4.555 |
| Infotainment | 1.178 | 41 | 1.219 |
| Børn/ung | 387 | 140 | 527 |
| Átrúnaður | 358 | 68 | 426 |
| Mentan | 1.360 | 124 | 1.484 |
| Ítróttur | 196 | 97 | 293 |
| **Samanlagt** | **8.791** | **622** | **9.413** |

Yvirlitið vísir einans føroyska framleiðslu

# Yvirlit yvir føroyskt framleitt tilfar til útvarpið



## Yvirlit yvir føroyskt framleitt tilfar til sjónvarpið



# Álit og nýtsla



# Álitisbarometrið

Síðani februar 2016 hevur Spyr.fo regluliga kannað, hvussu til stendur við áliti føroyinga á Kringvarpi Føroya og aðrar føroyskar miðlar. Álit er ein av fortreytunum fyri tilverurættinum hjá Kringvarpinum, og hesum arbeiðir stovnurin miðvíst við at varðveita og betra.



500 fólk í aldursbólkunum 18–29, 30–44, 45–59 og 60–80 ár í øllum landinum verða regluliga biðin um at meta um, hvussu stórt álit tey hava á føroyskum tíðindamiðlum sum heild og á Kringvarpinum. Tílíkar spurnakanningar skulu altíð takast við ávísum fyrivarni, men afturvendandi spurnakanningar sum hesar geva góðar ábendingar.

Í 2022 varð leisturin at máta álitið tillagaður nakað. Frá 2016 til 2021 hevur svarstigin verið 1–7, men í 2022 vórðu svarmøguleikarnir minkaðir niður í 4: *Stórt álit, Nokk so stórt álit, Ikki serliga stórt álit* og *Onki álit*. Hetta er fyri at fáa meira eftirfarandi tøl og fyri at flokka eftir sama stiga sum í altjóða kanningum. Eisini verður spurt, hvar svargevarnir meta seg vera politiskt á høgra-/vinstraásinum og um útbúgving. Broytingin í kanningarleistinum gevur greiðari ábendingar um álit føroyinga á Kringvarpinum.

Álitið er kannað 26 ferðir síðani 2016 og er komið í eina støðuga legu. Talið á føroyingum, ið siga seg hava stórt ella nokk so stórt álit á Kringvarpinum, hevur verið oman fyri 70 % øll árini.

Talvurnar niðanfyri vísa álitið og nýtsluna av pallum Kringvarpsins í ávikavist januar og september 2023.

## Álitisbarometrið

# Hvussu stórt álit hevur tú á upplýsingum, sum koma frá Kringvarpi Føroya / kvf.fo?



Álitisbarometrið

## Hvussu ofta brúkar tú Kringvarp Føroya / kvf.fo?



# Hyggjara- og lurtaratøl

Spyr.fo kannar hyggjara- og lurtaratøl fyri Kringvarpið nakrar ferðir um árið. Tílíkar spurnakanningar skulu takast við ávísum fyrivarni, men afturvendandi kanningar sum hesar geva góðar ábendingar.

Tølini fyri einstøku sendingarnar hjá Kringvarpinum, bæði smalar sendingar og sendingar, sum fevna víða, eru sum heild góð.

## Mánadagur 23. januar 2023

**Ymsar útvarpssendingar**

| | |
|---|---|
| Góðan morgun Føroyar | 44,20 % |
| Málteigurin | 24,20 % |
| Við Tórði á túri | 23,20 % |
| Morgunlestur | 0,80 % |
| Fótbóltsprát | 16,20 % |

**Dagur og vika**

| | |
|---|---|
| Dagur og vika við 3-2 | 58,40 % |

**Tíðindasendingar**

| | |
|---|---|
| Tíðindi kl. 7.00 | 21,20 % |
| Tíðindi kl. 7.30 | 26,40 % |
| Tíðindi kl. 8.00 | 27,20 % |
| Tíðindi kl. 9.00 | 15,60 % |
| Tíðindi kl. 12.20 | 48,20 % |
| Tíðindi kl. 14.00 | 6,20 % |
| Tíðindi kl. 15.00 | 10,20 % |
| Tíðindi kl. 16.00 | 8,60 % |
| Tíðindi kl. 17.00 | 12,40 % |
| Tíðindi kl. 18.00 | 50,40 % |

## Hósdagur 16. februar 2023

**Ymsar útvarpssendingar**

| | |
|---|---|
| Góðan morgun Føroyar | 39,20 % |
| Breddin | 31,20 % |
| Morgunlestur | 21,00 % |
| Ljóarin | 10,00 % |

**Dagur og vika**

| | |
|---|---|
| Dagur og vika | 51,80 % |

**Tíðindasendingar**

| | |
|---|---|
| Tíðindi kl. 7.00 | 16,00 % |
| Tíðindi kl. 7.30 | 25,20 % |
| Tíðindi kl. 8.00 | 22,60 % |
| Tíðindi kl. 9.00 | 19,60 % |
| Tíðindi kl. 12.20 | 48,40 % |
| Tíðindi kl. 14.00 | 8,20 % |
| Tíðindi kl. 15.00 | 8,60 % |
| Tíðindi kl. 16.00 | 7,00 % |
| Tíðindi kl. 17.00 | 12,40 % |
| Tíðindi kl. 18.00 | 43,00 % |

## Mánadagur 18. september 2023

**Ymsar útvarpssendingar**

| | |
|---|---|
| Góðan morgun Føroyar | 41,60 % |
| Málteigurin | 25,00 % |
| Morgunlestur | 24,00 % |
| Fótbóltsprát | 19,20 % |

**Dagur og vika**

| | |
|---|---|
| Dagur og vika við 3-2 | 54,00 % |

# Talgildir miðlar

Endamálið hjá Kringvarpinum við at vera á sosialum miðlum er at vísa og minna á, at á pallum okkara er ein ørgrynna av kunnandi, mennandi og undirhaldandi tilfari. Sosialu miðlarnir eru ein sýnisgluggi inn í okkara fjølbroytta heim. Við sosialu miðlunum eru vit til staðar, har fólkið er, og vit kunnu minna tey á, hvat Kringvarpið bjóðar.

Í flestu førum verða fólk á sosialum miðlum beind inn á kvf.fo, har alt sjónvarps- og útvarpstilfar er tøkt.

Í breddanum til høgru eru lyklatøl frá heimasíðuni og vangunum hjá Kringvarpinum á Facebook og Instagram. Eyðsýnt er, at fólk í Føroyum hava størstan áhuga fyri tilfari innan fyri evnini:

- Persónssøgur
- Politikkur
- Ymisk brøgd – eitt nú ítróttalig, tónleikalig og listalig
- Vanlukkur/kriminalitetur
- “Skeivar” søgur
- Myndafrásagnir
- Kendir føroyingar
- Umstrídd evni

## Lyklatøl frá kvf.fo

- Forsíðan á kvf.fo er vitjað tilsamans 31.030.456 ferðir í 2023. Hetta er fýra ferðir so nógv sum fyri fimm árum síðani
- Tilsamans 86.368.497 síður vístar í 2023
- 5,7 milliónir klikk á beinleiðis útvarp
- 2,93 milliónir klikk á beinleiðis sjónvarp
- Í miðal 7.700 klikk á andlát hvønn dag
- 80 % av vitjanunum á heimasíðuni vóru um fartelefon ella teldil
- Flestu fólk, sum vitjaðu kvf.fo í 2023, vóru í Føroyum (67,8 %), Danmark (14,93%), Íslandi (5,39 %), Norra (2,70 %) og Svøríki (1,62 %)



# 10 tær mest lisnu greinarnar á kvf.fo

1. Snarhús gjørdist ein marra
2. Tey sungu um allar Føroyar
3. Berin 20 ár: Mamman doyði í barsilssong
4. LIVE Eysturríki-Føroyar
5. Stúra fyri hvørjari nátt
6. Omma rópar neyðarróp
7. VIDEO: "Røvarar og politi" í Skopunarfirði
8. Ukrainskur hermaður hvílir undir Bøsdalafossi
9. Bakarí meldað til løgregluna
10. Giftist kvinnu, hann ikki kendi

Lyklatøl frá Instagram og Facebook

## 532 túsund vitjanir á Facebook-vanganum

## 24,3 túsund á Instagram-vanganum



# Aktuelt



# Umfatandi sparingar og betraðir karmar




Árið 2023 var hendingaríkt. Tað var tó ikki korona, sum gav okkum avbjóðingar hesa ferð, og einki val setti dagsskránna eins og í 2022. Hesa ferð vóru avbjóðingarnar av heilt øðrum slag og við eini andsøgn. Samstundis sum Aktuelt fekk eina tiltrongda umvæling, og sjónvarpsstovan varð umskipað, so endaði árið við umfatandi sparitiltøkum og uppsagnum, sum seinni vórðu tiknar aftur, tí politisk lyfti merktu, at grundarlagið fyri sparingunum helst ikki fór at halda. Tí varð farið inn í 2024 við eini óvissu, samstundis sum Aktuelt fekk nýggjan tíðindaleiðara. Georg L. Petersen segði seg úr starvi summarið 2023, og eftir at søkt var eftir tíðindaleiðara í tveimum umførum, varð Katrin Petersen sett í starv og tók við á nýggjárinum.

## Sparingar

At vit kundu vænta sparingar, spøkti ein stóran part av 2023. Eftir drúgva fyrireiking boðaði leiðslan í november 2023 frá, at 2024 fór at geva stovninum eitt hall á stívliga átta milliónir krónur, og at starvsfólkahópurin mátti skerjast við ellivu ársverkum. Hetta var aðru ferð í bert tvey ár, at Kringvarpið mátti fremja umfatandi sparingar. Í 2021 spardi stovnurin stívliga seks milliónir krónur. Tá vórðu útivið sjey ársverk spard burtur.

Á Aktuelt vórðu sparingar settar í verk, sum serliga høvdu við sær uppsagnir og skerjingar av sendingum. Hetta var ein ógvisligur umgangur, men brádliga broyttist alt, tá ið politiska skipanin boðaði frá, at hon arbeiddi við eini prístalsjavning og øðrum, sum skuldu betra fíggjarstøðuna. Avgerð varð tikin um at taka so at siga allar sparingar aftur, og fólk, sum høvdu fingið uppsøgn, vóru boðin at koma aftur. Hetta elvdi sjálvsagt til nógv rumbul og nógvan ófrið á Aktuelt, eins og aðrastaðni í húsinum.

## Framleiðslur í sjónvarpinum

Vanligt hevur verið, at Dagur og vika minkar talið av sendingum, tá ið summarið kemur. Í 2023 gjørdu vit av at senda Dag og viku fýra ferðir um vikuna, eisini summarmánaðirnar. Hetta eydnaðist væl, hóast onkur bar ótta fyri, at soðið fór at verða tunt. Men summarið varð sjálvandi dýrari av somu orsøk.

Í 2021 fóru vit undir at menna stuttdokumentarar at senda í sjónvarpinum, og seinni var ein dokumentareind skipað undir Breddanum. Ein skipan varð gjørd við redaktørum, sum mettu um innkomin hugskot.

Í 2023 vórðu pengar aftur settir av at gera dokumentarar; men rímiliga skjótt gjørdist greitt, at fíggjarstøðan hjá stovninum fór at seta avmarkingar. Men vit náddu hóast hetta at framleiða nakrar sendingar til sjónvarpið.

### Ukrainar á Tvøroyri

Tá ið kríggið brast á í Ukraina, komu fleiri flóttafólk til Føroya. Tvøroyri var ein av fyrstu kommununum at bjóða seg fram at taka ímóti flóttafólkum. Vit gjørdu av at fylgja familjunum, sum fóru til Suðuroyar, í eitt ár og at vitja tær við jøvnum millumbilum. Í mars mánaði varð sendingin "Flýdd til friðin í Froðba" send í sjónvarpinum. Hon vísti gleði og takksemi, men eisini hvørjar avbjóðingar vóru.

### Uppihald í óvissu

Í 2023 søgdu vit søguna um nakrar ungar norðurafrikanarar, sum vóru komnir til Føroya at arbeiða í matstovuvinnuni. Tað vísti seg tó skjótt, at arbeiðsumstøðurnar vóru ótolandi, lønin ikki sum avtalað og so framvegis. Her var talan um fólk, sum vóru sera heft at sínum arbeiðsgevara, eisini tá ið tað ráddi um at samskifta við samfelagið rundanum og myndugleikarnar. Men hvørjir vóru hesir menninir? Hvaðani komu teir, og hví valdu teir at koma til eitt so fjarskotið stað sum Føroyar? Hetta vildi dokumentareindin kanna, og vit sendu journalist og fotograf til Tunesia saman við tveimum av monnunum fyri at koma nærri at bakgrundini. Í juni mánaði varð sendingin "Uppihald í óvissu" send í sjónvarpinum.

### Á evroparáðsfundi

Javnan verður skipað fyri fundum uttanlands um altjóða viðurskifti, sum kunnu vera viðkomandi fyri




Føroyar. Vit fara tó sera sjáldan á nakran av hesum fundum, men í mai mánaði 2023 sendu vit ein journalist og ein fotograf til Reykjavíkar á evropa-ráðsfund. Hetta tók eina viku og gav tilfar bæði til sjónvarp, Breddan og útvarpstíðindini.

## Framleiðslur í útvarpinum

Tíðindini í útvarpinum hava søguliga havt stóran týdning her á landi. Tey kunna føroyingar fleiri ferðir um dagin um, hvat hendir í samfelagnum, so fólk eru før fyri at luttaka í upplýstum kjaki. Vit hava nakrar stuttar tíðindasendingar fyri at fylgja við aktuellu støðuni og so tvær longri sendingar á miðdegi og á nátturða.

Breddin var í 2023 mannaður av eini redaktión við trimum fólkum, har farið varð meira í dýpdina við nøkrum evnum fýra dagar um vikuna – týsdag, mikudag, hósdag og fríggjadag. Breddin byrjaði í 2019, og smáar tillagingar eru gjørdar síðani. Breddin hevur funnið sína legu millum klokkan tíggju og ellivu, so hann eisini kann lata tilfar til tíðindasendingarnar á døgurða og á nátturða. Tá ið sparingar skuldu fremjast í 2023, varð avgjørt at skerja Breddan, so hann í staðin fyri at verða sendur fýra ferðir um vikuna, nú skuldi sendast tríggjar ferðir. Eisini skuldi manningin skerjast úr trimum niður í tvey fólk. Henda sparingin varð ikki tikin aftur eins og fleiri aðrar.

## Ítróttur

Ítróttaredaktiónin ger eina vikuliga ítróttasjónvarps-sending – 3-2 – mánakvøld kl. 19.30 og ítróttatíðindi til Dag og viku hóskvøld. Kappróður verður sendur beinleiðis í sjónvarpi og útvarpi. Í útvarpssendingini "Bólturin" er beinleiðis frásøgn frá bestu mans-deildini í fótbólti. Í Fótbóltspráti hvønn mánadag verður fótbólturin um vikuskiftið eisini greinaður nærri.

Ein av nýggju avbjóðingunum í ítróttinum er, at talið av beinleiðis sjónvarpsframleiðslum økist støðugt. Nógv hevur verið gjørt við landsliðsfótbólt, men avgerð er tikin um eisini at framleiða og senda landsdystir hjá kvinnum og monnum í hondbólti. Hetta gevur eitt økt arbeiðstrýst, men eisini nógvar spennandi uppgávur, sum okkara hyggjarar eru glaðir fyri.

## Sendingar tvørtur um pallar

Í 2020 settu vit okkum fyri at hava fleiri smærri beinleiðis framleiðslur við áskoðarum, sum skuldu samantvinna net og sjónvarp. Fyrsta royndin varð gjørd á Heystfagnaði á Eiði, og vit sendu eisini frá Torradøgum í Klaksvík. Hesir fundir høvdu áskoðarar, men vit bjóðaðu eisini lurtarunum við á heimasíðuni, har til bar at seta spurningar.

Í 2023 sendu vit bara frá Torradøgum, tí ein dystur hjá føroyska manslandsliðnum í fótbólti fall júst á dagin, tá ið Heystfagnaðurin skuldi sendast. Í 2022 fall Heystfagnaðurin eisini burtur vegna val til Fólka-tingið.

Av tí at hetta eru bíligar og lættar framleiðslur, so var ætlanin at menna hetta uppaftur meira við fleiri ár-ligum fundum. Vit høvdu funnið ein leist, sum gjørdi hetta møguligt.





## Heimasíða og sosialir miðlar

Heimasíðan er ein alsamt meira týðandi partur í tíðindaflutninginum hjá Kringvarpi Føroya. Sambært ætlanini um talgilda snaring eru talgildu pallarnir ein drívandi megi, tá ið framleiðslurnar skulu røkka brúkarunum. Heimasíðan verður ment enn meira, og nýtslan av sosialum miðlum – fyri at fáa brúkarar haðani inn á okkara pallar – verður økt. Ætlanin varð sett á skinnarar í 2021, men arbeiðið varð nakað darvað av sparingum á stovninum. Menningar-arbeiðið tók aftur dik á seg í 2022 og helt fram í 2023.

Ein liður í menningararbeiðinum er at fáa fram-leiðslurnar til brúkararnar einfaldari. Menningin av heimasíðuni er grundarlagið undir arbeiðinum at røkka brúkarunum umvegis appir, so fólk umvegis fartelefon kunnu velja, hvørjum tey vilja hyggja at og lurta eftir. Kringvarpið kunngjørdi í 2023 eina app til barnaøkið, og ætlanin er, at tær eisini skulu fram-leiðast til sjónvarp og ljóð.

## Umbyggingar bøttu munandi um karmarnar

Mong ár gingu aftan á samanleggingina av Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya í 2005, áðrenn tey síðstu fluttu úr sjónvarpshølunum í M.A. Winthers-gøtu niðan í kringvarpsbygningin í Sortudíki. Tíðindadeildin í sjónvarpinum flutti niðan í 2012. Tá vórðu hølini nakað broytt. Leiðslan tá tók tó ikki stig til, at ein verulig umbygging ella nútímansgerð bleiv framd. Mongu elektrisku skipanirnar fingu heldur ikki ta neyðugu uppstiganina.

Tískil gjørdust hølini hjá tíðindaredaktiónini á Aktuelt alt meira niðurslitin, og arbeiðsumstøðurnar vóru alt annað enn góðar. Nýggja leiðslan setti í 2019 út í kortið, at ábøtur skuldu fremjast. Millum annað sparingar í 2021 gjørdi, at vit ikki komu á mál. Hetta kundi tó ikki bíða longur, og í 2023 varð avgerð tikin um at seta eina stóra umvæling í gongd. Avbjóðingin var, hvar redaktiónin skuldi vera, meðan arbeiðið fór fram. Ymsar fyribilsloysnir vórðu funnar, og dagur varð settur á, nær umvælingarnar skuldu verða lidnar, og redaktiónirnar kundu koma upp á pláss aftur. Starvsfólk tóku væl ímóti ætlanunum, hóast onkur var ivasamur, um tíðarfreistin fór at halda – men hon helt. Vit kunnu bara staðfesta, at tilgongdin og arbeiðið virkaðu til fulnar, og úrslitið var eisini gott. Nú sita fólk væl, og allar el- og netinnleggingar eru dagførdar.

Farið varð undir síðstu dagføringarnar av sjónvarps-stovuni í 2023. Hetta var fyribils síðsti liður í menn-ingini av Degi og viku. Sendingin bleiv innihaldsliga broytt munandi í 2019, og sjónvarpsstovan varð eisini bygd um, so hon hóskaði til innihaldið. Til-lagingar hava javnan verið gjørdar – tann størsta í 2022, tá ið nýggjur stórskíggi varð settur upp. Hetta hevur virkað væl. Í 2023 bleiv gjørd ein nýggj ljós-seting av sjónvarpsstovuni, sum gjørdi, at borðið og stóru skíggjarnir komu betur til sín rætt. Farið varð undir arbeiðið í 2023, og í januar 2024 var klárt at fara í luftina við eini flottari og dagførdari sjónvarps-stovu.

# Ítróttur



# Ítróttalívið í Føroyum stendur í blóma



Gávurík ítróttafólk og einastandandi brøgd merktu árið 2023.

Søguliga EM-plássið hjá manslandsliðnum í hondbólti, nýggja metið hjá Jónasi Gunnleivsson Isaksen í renning og KÍ, sum megnaði at spæla seg í Conference League, eru millum stórhendingarnar í 2023, sum vaktu ans bæði úti og heima.

Kringvarpið skjalfesti eina rúgvu av týðandi hendingum í føroyskum ítrótti. Nakrar teirra eru lýstar her.

**Tryggjaðu sær søguligt EM-pláss**

Seinastu árini hevur hondbóltslandsliðið við monnum helst verið størsta søgan og kyndilsberin í føroyskum ítrótti. Spælarar sum Elias Ellefsen á Skipagøtu og Hákun West av Teigum hava vunnið seg fram í altjóða hondbólti – báðir spæla nú í fremstu feløgum í heimsins bestu deild, týsku Bundesliguni – og saman við liðfeløgunum megnaðu teir á dramatiskan hátt at spæla seg til EM-endaspælið í Týsklandi. Kringvarpið er fegið um, at føroyingar hava sæð hesar stórhendingar beinleiðis í sjónvarpinum.

**Rakettin úr Kvívík**

Ein ungur kvívíkingur rann seg inn í ítróttatilvitskuna hjá føroyingum í 2023. Jónas Gunnleivsson Isaksen kveistraði alla mótstøðu til viks á Oyggjaleikunum á Guernsey, har hann vann á bæði 200 og 400 metra teininum við nýggjum oyggjaleikameti. Hetta var bara byrjanin hjá "rakettini úr Kvívík". Í august gjørdist hann – bert 17 ára gamal – U20-evropameistari í 400 metrum við nýggjari mettíð fyri U20-aldursbólkin. Søga hansara er eisini serstøk í aðrar mátar, og hana hava vit verið glað fyri at sagt fyri føroyingum.





**KÍ stjól yvirskriftirnar í Evropa**

Tey flestu ristu við høvdinum, tá ið KÍ fyri einum tíggju árum síðani proklameraði, at mansliðið ætlaði sær í eitt evropeiskt bólkaspæl. Eftir at hava verið nær við nakrar ferðir, eydnaðist tað hjá teimum bláu undir leiðslu av Magne Hoseth at spæla seg í Conference League við sigrum á Ferencváros, BK Häcken og Molde, meistarunum í ávikavist Ungarn, Svøríki og Norra. Yvirskriftir um "pitsaseljaran", Árna Frederiksberg, og hinar í KÍ vóru at síggja í alskyns evropeiskum miðlum saman við myndum frá m.a. Kringvarpinum, sum sendi fleiri av evropeisku dystunum hjá klaksvíkingunum og helt fram at fortelja evropeisku søguna um KÍ, sum ikki endaði fyrr enn í desember.

**Sterki miðvingurin**

Sverri Sandberg Nielsen er ikki ókendur. Á ólavsøku í 2021 savnaði hann túsundtals føroyingar á Busatanga, tá ið hann akkurát var ov stuttur til olympiskt heiðursmerki í einskullara. Rógvarin ivaðist í, um hann skuldi gevast, men í 2023 valdi hann at gera nýggja roynd eftir olympiskum heiðursmerki. Higartil hevur hilnast væl, og miðvingurin megnaði at rógva seg til pláss á Olympisku leikunum í 2024. Eisini honum hevur Kringvarpið fylgt nær seinastu nógvu árini og eisini í 2023.

Afturat hesum fylgir Kringvarpið heimligum ítrótti neyvt eftir førimuni bæði í útvarpi og sjónvarpi, og tað sæst aftur í ársuppgerðini niðanfyri.

Ítróttur í sjónvarpinum

# Metnógvar ítróttaframleiðslur

Yvirlitið vísir ítróttin, sum Kringvarpið hevur sent beinleiðis í sjónvarpinum ella á kvf.fo í 2023. Afturat hesum er útvarpsítróttur sum til dømis beinleiðis fótbóltur, Fótbóltsprát og so sjálvandi 3-2, sum verður sent á leið 40 ferðir um árið.

Í 2023 sendi Kringvarpið 46 ferðir frá ítróttatiltøkum í Føroyum og heiman. Hetta er størsta talið nakrantíð.

**Januar**

| | |
|---|---|
| 29. | Fyrra steypakappingin í estetiskum fimleiki |

**Februar**

| | |
|---|---|
| 4.-5. | ÍSF-ítróttafagnaðurin |
| 25. | Steypafinalurnar í hondbólti |

**Mars**

| | |
|---|---|
| 4. | Steypafinalurnar í flogbólti |
| 8. | Føroyar-Rumenia (hondbóltur, menn) |
| 11. | Rumenia-Føroyar (hondbóltur, menn) |
| 23. | Seinna steypakappingin í estetiskum fimleiki |
| 24. | Føroyar-Moldova (fótbóltur, menn) |

**Apríl**

| | |
|---|---|
| 18 | Kontrast FM |
| 26. | Føroyar-Ukraina (hondbóltur, menn) |
| 30. | Eysturríki-Føroyar (hondbóltur, menn) |

**Mai**

| | |
|---|---|
| 8. | FM í estetiskum fimleiki |
| 10. | Lutakast til EM-endaspælið í hondbólti |

**Juni**

| | |
|---|---|
| 3. | Kappróður, norðoyastevna |
| 17. | Føroyar-Kekkia (fótbóltur, menn) |
| 17. | Kappróður, sundalagsstevna |
| 20. | Føroyar-Albania (fótbóltur, menn) |
| 20. | Angola-Føroyar (hondbóltur, U21-menn) |
| 22. | Japan-Føroyar (hondbóltur, U21-menn) |
| 23. | Spania-Føroyar (hondbóltur, U21-menn) |
| 24. | Kappróður, jóansøka |
| 25. | Brasil-Føroyar (hondbóltur, U21-menn) |
| 26. | Portugal-Føroyar (hondbóltur, U21-menn) |
| 29. | Serbia-Føroyar (hondbóltur, U21-menn) |

**Juli**

| | |
|---|---|
| 1. | Danmark-Føroyar (hondbóltur, U21-menn) |
| 1. | Kappróður, Varmakelda |
| 2. | Kroatia-Føroyar (hondbóltur, U21-menn) |
| 3. | Kappróður, jóansøka |
| 8. | Kappróður, fjarðastevna |
| 8.-14. | Oyggjaleikir á Guernsey |
| 15. | Kappróður, vestanstevna |
| 26. | KÍ-Hacken |
| 28. | Kappróður, ólavsøka |

**August**

| | |
|---|---|
| 2. | Hacken-KÍ |
| 8. | KÍ-Molde |
| 15. | Molde-KÍ |
| 24. | KÍ-Sheriff |
| 31. | Sheriff-KÍ |

**September**

| | |
|---|---|
| 7. | Pólland-Føroyar (fótbóltur, menn) |
| 10. | Føroyar-Moldova (fótbóltur, menn) |

**Oktober**

| | |
|---|---|
| 12. | Føroyar-Pólland (fótbóltur, menn) |
| 12. | Svøríki-Føroyar (hondbóltur, kvinnur) |
| 15. | Kekkia-Føroyar (fótbóltur, menn) |
| 15. | Føroyar-Ísland (hondbóltur, kvinnur) |

**November**

| | |
|---|---|
| 3. | Ísland-Føroyar (hondbóltur, menn) |
| 4. | Ísland-Føroyar (hondbóltur, menn) |
| 20. | Albania-Føroyar (fótbóltur, menn) |

# Mentan



# Savnandi, undirhaldandi og ríkandi

Eins og undanfarin ár hava starvsfólk og fríyrkisfólk á Mentanardeildini framleitt útvarps- og sjónvarpssendingar, sum hava savnað føroyingar á merkis- og hátíðardøgum, umframt gjørt sendingar og tilfar, sum hava skapt kjak, undirhildið og upplýst. Talan er um eina sera breiða viftu av sendingum á økjunum børn, mentan, átrúnað, siðsøgu, tónleik, dokumentarsendingar og annað. Talan er bæði um afturvendandi sendingar og nýggjar framleiðslur. Felagsnevnarin fyri skránna er, at hon er fjølbroytt og lýsir og viðger føroyska samfelagið við public service-sáttmálanum sum grundarsteini.

## Sjónvarp

Umframt at gera sendingar skriva vertirnir eisini greinar til heimasíðu og gera tilfar til sosialar miðlar. Serliga Góðan morgun Føroyar og Við Tórði á túri hava verið eyðsýnd á heimasíðuni, Facebook og Instagram við greinum, myndum og videobrotum, sum eru ein liður í royndini at fáa brúkarar inn á okkara pallar. Men eisini í sambandi við aðrar sendingar hevur nógv tilfar verið á netinum.

Á barnaøkinum hevur VIT-appin verið eitt frambrot. Hon hevur bøtt munandi um atgongdina til dygdargóða føroyska barnatilfarið. Í útvarpinum eru broytingarnar í lista- og mentanartilfarinum mest eyðsýndar. Seinnapartssendingin Nón er farin av skránni, og í staðin eru sendingar sum Vágskálin, Samværi og Vikan komnar. Í sjónvarpinum eru dokumentarsendingarnar hóskvøld framvegis bulurin í framleiðsluni – nevnast kann stóra sendirøðin hjá Suna Merkistein og Jógvani Eli Dam, “O, móðurlandið”. Eisini aðrar forkunnugar sendingar og røðir hava verið á skránni, m.a. røðin “Egil Bakka – føroysk dansispøl”, sum byggir á næstan 40 ára gamlar sjónvarpsupptøkur av føroyskum dansi kring Føroyar.

Niðanfyri eru nakrar av sendingunum úr rúgvuni í 2023 nærri lýstar.

### Dokumentarsendingar

**O, móðurlandið**

Seks partar eru í alt í sendirøðini “O, móðurlandið”. Í sendirøðini um Føroyar í ríkisfelagsskapinum verður ljós varpað á støðu okkara í danska ríkinum. Landafrøðiliga, mentanarliga og málsliga skilja Føroyar seg burturúr í ríkisfelagsskapinum. Búskaparliga hevur framburðurin síðan aldamótið verið so stórur, at Føroyar teljast millum ríkastu samfeløgini í heiminum í dag. Kortini tykist spurningurin um at ráða yvir sær sjálvum ikki so viðkomandi longur og hevur ikki verið frammi sum eitt nevnivert tema á seinastu løgtingsvalunum. Tvørturímóti er fatanin av okkum sjálvum sum samrunnin minniluti í danska eindarríkinum kanska sterkari nú enn fyrr.

Farið verður víða um í einari breiðari lýsing av evninum. Nýggjar samrøður eru gjørdar við fleiri enn fjøruti fólk, hartil er fitt av eldri tilfari útvegað bæði úr føroyskum og donskum søvnum.

Sendirøðin elvdi til nógv kjak, hvørt grundsjónarmiðið í røðini lá nærri loysingarhugsjónini ella ei.

Suni Merkistein og Jógvan Eli Dam
gjørdu sendirøðina.

### Útilív

Tá ið summarið nærkast, eru nógv, sum gleða seg til feriur í heitari londum. Men hjá teimum, ið ikki ætla sær so langa leið, er ein rúgva av upplivingum, sum bíða eftir teimum beint her í Føroyum.

Gongutúrar í haganum, tjalding ella sílaveiða kann vera minst líka minnisríkt fyri familjuna sum túrar til Mallorka. Og so er útilívið gott fyri bæði kropp og sinn.

Men hvussu gert tú? Hvat skal til, og hvar kanst tú fara? Hetta er sjálvandi ikki so lætt at byrja við, men í trimum sendingum vísti Kringvarpið á ymiskar mátar at njóta útilívið í Føroyum.

Jens Jákup Hansen og Jónfinn Stenberg
løgdu til rættis.

### Lítli Petur

Lítli Petur gjørdist landskendur í Føroyum, tá ið hann fyri 20 árum síðani misti mammu sína í eini vanlukku og varð sendur á stovn í Danmark. Petur vaks upp á einum stovni fyri atferðartrupul børn og kom ikki aftur til Føroya. Kringvarpið var og vitjaði Petur í Danmark, har hann framvegis býr. Petur greiðir í sendingini m.a. frá, hvussu hann upplivdi at verða sendur á stovn í Danmark og um, hvussu lív hansara hevur háttað sær hesi 20 árini.

Sendingina gjørdu Dagmar Joensen-Næs
og Jónfinn Stenberg.

### Grønjakkar í Havn

Dreingir í grønum jakkum vóru javnan at síggja í gøtunum í Havn í 80'unum og 90'unum. Nógv ræddust grønjakkarnar, sum fyri tað mesta gingu skeivir av hassji ella øðrum rúsevnum og kundu finna upp á mangt og hvat.

Dagmar Joensen-Næs, Regin Dalsgarð
og Hans Petur Hansen gjørdu sendingina.

### Stóra Dímun

Í 12 ár hava tvey húski búð í Stóru Dímun, og fýra vaksin fólk hava verið felags um arbeiðið á garðinum. Men síðani í fjørheyst hava bóndahjúnini Eva úr Dímun og Jógvan Jón Petersen verið einsamøll og gjørt alt tað dagliga arbeiðið á oynni.

Í tveimum sjónvarpssendingum fylgja vit Evu úr Dímun og Jógvan Jón Petersen, sum nú eru einsamallir festarar á Stóru Dímun. Vit eru við í dagliga arbeiðnum, har hvør dagur verður lagdur til rættis eftir veðrinum.

Sendingina gjørdu Tórður Mikkelsen
og Jakob Jørgensen.






**Skeivur sum ein hani**

Orð og løg frá Jóan Jakku Guttesen hava í mong ár ríkað føroyska tónleikaheimin. Fáur megnar sum Jóan Jakku og hansara vinfólk í Tinganesti og Vágaverki at fáa lív í fjøldina á konsertum og festivalum.

Rock'n'roll og hippierørsla í 60'unum myndaðu unga gávuríka mannin úr Sørvági, sum ikki vildi verða akademikari sum vinmenninir, men setti æru í at vera proletarur. Umframt at skriva eina perlurøð av sangum, sum flestallir føroyingar duga uttanat, hevur hann arbeitt við pensli og blikki sum málari.

Dagmar Joensen-Næs og Jens Jákup løgdu til rættis.

## Aðrar framleiðslur

**Sært tú meg?**

'Sært tú meg?' er ungdómsheimildarrøð, har ung seta orð á torførar kenslur. Vit seta fýra fremmand ung saman í fýra stólar. Ein er reyður, og tað er har frásøgufólkið, ella tann, ið sigur sínar hugsanir, situr. Spyrjararnir sita í hinum trimum stólunum. Evnini eru m.a. øðrvísi familjulív, bundinskapur, sjálvmorð og integratión.

Maria Winther Olsen, Anna Joensen-Næs og Eyðun Müller Thomsen stóðu fyri framleiðsluni.

**Egil Bakka – føroysk dansispøl**

Í 1977 var norski professarin Egil Bakka í Føroyum og gjørdi forkunnugar filmsupptøkur av føroyskum dansispølum og føroyskum dansi í sjey bygdum kring oyggjarnar.

Hesar upptøkur er nú talgildaðar og settar saman til átta sendingar við samrøðum, frásagnum og dansi.

Gunnar Restorff v.fl. løgdu til rættis.

**Altjóða kvinnudagur í Fuglafirði**

Í 2023, eins og í 2022, sendi Kringvarpið beinleiðis frá altjóða kvinnudegnum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Tiltakið 'Konubrot og britubrim' viðger manglandi javnstøðuna og møguleikarnar fyri einum betri samfelagi í framtíðini. Sofaprát, skemt og spísk upplegg, kryddað við list og tónum.

Raclip framleiddi sendingina fyri Kringvarpið.

**Innsavningar**

Í mars mánaði var stór innsavning til frama fyri Beran í sambandi við, at felagsskapurin fylti 20 ár. Sendingin varð send beinleiðis úr Norðurlandahúsinum. Talan var um eina sending við samrøðum, innsløgum um virksemið hjá Beranum og tónleiki. Kári Sólstein og Eydna Skaale vóru vertir.

Eins og undanfarin ár hevði Barnabati sína jóla- og innsavningarkonsert. Í ár var konsertin í Christianskirkjuni í Klaksvík.



**Beinleiðis sjónvarp á ólavsøku**

Sum siður er, sendi sjónvarpið beinleiðis frá setanini og kappróðrinum, umframt at beinleiðis sending var ólavsøkuaftanskvøld úr miðbýnum í Havn. Studio var á Vaglinum, og fólk við sendarum vóru stødd ymsastaðni í Havnini. Vit fingu m.a. gestir í studio, hoyrdu kórsang og vóru til Pride-skrúðgongu.

Ólavsøkudag varð eisini sent beinleiðis – m.a. frá gudstænastu, skrúðgongu, kórsangi á Vaglinum og tingsetanini.

**Fagnaðarløta fyri Martini Joensen**

Listamaðurin Martin Joensen fylti 70 ár í august 2023, og í hesum sambandi skipaðu Vestmanna kommuna og Sprotin fyri fagnaðarløtu í Miðnámi í Vestmanna leygarkvøldið 26. august. Martin varð heiðraður við røðum, tónleiki og framførslum.

**Beinleiðis sjónvarp á nýggjárinum**

Beinleiðis sending í sjónvarpinum er vorðin fastur táttur nýggjársaftan. Sent verður úr forhøllini í Sortudíki við gestum, beinleiðis innsløgum um landið, løgmansrøðu, skemti og nýggjársheilsanum.

Sára Jógvansdóttir var redaktørur, og Bjarnheðin í Hoyvík framleiddi. Vertir vóru Jákup Dahl og Elin Mirjamsdóttir.

Umframt beinleiðis sjónvarpssending á nýggjárinum framleiddi Kringvarpið eisini Syngið Við, sum í 2023 var tikið upp í Hvalba, og nýggjársgudstænastu, sum var á Sandi.



# Útvarp

Útvarpsskráin er bygd upp við flatum, har sent verður dagliga við sendingum og røðum. Gerandisdagarnir hava rútmu, har dagarnir líkjast, meðan vikuskiftini eru øðrvísi.

**Góðan morgun Føroyar**

Morgunsendingin í útvarpinum er gerandismorgnar frá klokkan 7.35 til 9.50. Sendingin leggur seg eftir at viðgera aktuel evni, skapa egnar søgur og at vera í eygnahædd við breiðu lurtarafjøldina um alt landið.

Dentur verður fyrst og fremst lagdur á útvarpspartin, men virksemið á sosialum miðlum er eisini nógv vaksið.

Eitt av stóru átøkunum í fjør var, at morgunsendingin tók stig til, at føroyingar saman sungu Ró hjá Martini Joensen. Hetta var í sambandi við, at tónaskaldið fylti 70. Fólk lógu ikki á boðunum, tí inn komu fleiri enn 100 videoupptøkur. Burtur úr hesum varð samandráttur gjørdur, ið telist millum okkara mest sæddu brot í fjør.

**Vikan**

Vikan sá fyrstu ferð dagsins ljós á heysti 2023. Vikan, sum er beinleiðis sending leygarmorgnar, tekur pulsin á vikuni, sum fer. Sendingin setir aktuellar søgur, hendingar og rák í eitt annað ljós. Við kjaki, samrøðum og satiru geva vit føroyingum eina løtu til umhugsni við einum skeivum smíli.

Vertir eru Ingi Rasmussen og Leif Láadal.

**Vágskálin**

Vágskálin er sending við mentanarligum ummælum. Tveir ummælarar eru við hvørja ferð, og í flestu førum verða bøkur vigaðar á vágskálini. Ummælini verða gjørd sum samrøður í útvarpsstovuni, og brot verða spæld úr tí, sum ummælt verður. Á vágskálina kunnu eisini verða lagdir sjónleikir, framsýningar og framførslur. Serlig rák í tíðini verða viðhvørt vigað og viðgjørd.

Uni Arge leggur til rættis.

**Skrivað stendur**

Tvær tekstarøðir eru í kirkjuni. Tann fyrra stavar heilt afturi frá ár 500, og seinna er frá 1895. Har eru tekstir úr Nýggja Testamenti savnaðir, og teir fylgja kirkjuárinum, sum byrjar fyrsta sunnudag í advent. Aldargomlu tekstirnir eru framvegis viðkomandi, men hvussu lesa vit teir, og hvussu skilja vit teir?

Í sendingini “Skrivað stendur” lesa vit tekstin og siga frá hugtøkum og øðrum, sum er tongt at honum. Gestir viðgera tekstin, og ymis fólk eru við hvørja ferð.

Armgarð Arge og Kári Sólstein leggja til rættis.

**Samværi**

Tvey listafólk, Beinir Bergsson, yrkjari, og Dania O. Tausen, yrkjari og tónlistafólk, hitta hvørja viku tvey onnur listafólk og tosa um list.

Í hvørjum parti koma listafólk í prát við onnur, sum tey kanska annars ikki høvdu komið í samband við í listaheiminum. Listafólkini tosa um listina og viðurskiftini hjá hvørjum øðrum.

Sendingin hevur ikki nakað aktualitetsprinsipp galdandi fyri luttøku í sendingini, men heldur vilja vertirnir sjálvir seta ymist á breddan.

Dania og Beinir tosa á jøvnum føti við gestalistafólkini, og somuleiðis verða gestirnir bidnir um at seta seg inn í listina hvør hjá øðrum, soleiðis at samrøðan kann fara djypri inn í tilgongdir og smálutir.



## Røðir og stakar sendingar

Umframt størru flaturnar eru ein rúgva av røðum og støkum sendingum á skránni. Tær føstu og væl kendu sendingarnar eru m.a. Við Tórði á túri, Brunsj, Vikuskiftið, Meg minnist, Credo og Málteigurin. Í seinnu hálvu var Kvørnin á skránni hvønn mikudag við tónleikaummælum. Harafturat hava fleiri styttri og longri røðir verið á skránni í 2023.

### Kulfaktor Føroya

Í hesari røðini leita vit eftir kulfaktorum um landið: Hvat skapar og eyðkennir tann góða býin og ta góðu bygdina? Er tað ymiskt, alt eftir hvar í landinum vit eru? Hvussu mennir tú tað góða staðið? Og eru nakrir felagsnevnarar galdandi uttan mun til bústað og persónliga áskoðan? Og hvørjir kulfaktorar gera seg galdandi, tá ið ein bygd ella ein býur fær góð skoðsmál, og hvønn týdning hevur tað – bæði fyri bygdina/býin, og tey, sum búgva har?

Hesir eru nakrir av spurningunum, ið verða viðgjørdir í sendingini.

Gunnar Nolsøe legði til rættis.

### Feigdarboð í Kanada

Ljóðmynd um lagnuna hjá Heina Restorff Heinesen, sum fór í útrás til Kanada einans 19 ára gamal í 1921. Hann kom heim aftur í kistu fimm ár seinni. Heini var beiggi William Heinesen, og William lýsti lívsleið hansara fyri vinmanninum Jørgen Frants Jacobsen soleiðis, sum hon kom til sjóndar í brævaskifti, hann hevði við beiggja sín, meðan hann var í Kanada.

Magni Arge legði til rættis og týddi úr bókini og brævasavninum "Vinaliga".

### Føroyskur landbúnaður – vit kunnu so nógv meira

Stórar broytingar hava verið í føroyskum landbúnaði seinastu árini. Serliga er tað millum teirra, sum framleiða mjólk, at broytingarnar eru hendar. Um aldarskiftið vóru millum 60 og 70 garðar. Í dag eru bara 14 ella 15 framleiðslueindir eftir. Hvønn týdning hevur henda broytingin havt, og hvørjar møguleikar gevur hon? Ikki bara á teimum gørðunum, sum eru eftir, tí teir hava lættari við at fáa gerandisdagin at hanga saman, men eisini í sambandi við aðra framleiðslu.

"Føroyskur landbúnaður – vit kunnu so nógv meira" er røð í níggju pørtum, sum Sveinur Tróndarson legði til rættis.

### Café SALT

Café SALT er kvøldseta við bæði álvarsomum og skemtiligum innihaldi, sum verður send beinleiðis av SALT á Drelnesi. Eisini er livandi tónleikur partur av sendingini. Í sambandi við at Sandoyartunnilin læt upp í desember, var sersending av Sandoynni, tá ið Café SALT varð send av Virkinum á Sandi.

Vertir eru Ólavur Rasmussen og Jákup Magnussen.

**Petur Wigelund**

Í trimum pørtum verður søgan um Petur Wigelund søgd. Petur Wigelund vaks upp í Havn fyrst í 1900-talinum, men fór sum ungur niður til Keypmannahavnar at nema sær kunnleika um báta- og skipasmíð. Umframt handverkið so lá eisini raðið fyri hjá Peturi Wigelund at íðka nevaleik, og tað var upp á tal, at Petur skuldi umboða Danmark á Olympisku leikunum í Antwerpen í 1920.

Í 1926 flutti Petur Wigelund til Íslands og bleiv ein nógv umhildin maður, ið smíðaði íslendingum dygdargóðar bátar og skip. Abbasonur Petur Wigelund, Petur Wigelund Kristjánsson, gjørdist kendur tónleikari í Íslandi.

Hans Stephanson Egholm legði til rættis.

**Nert ikki við**

"Nert ikki við" er røð í útvarpinum, sum nertur við evni, ið vit vanliga ikki tosa um á sálarheilsuøkinum í Føroyum. Evnini hava m.a. verið eldri og sálarheilsa, happing, forelskilsi og hjartasorg.

Sendingarnar verða gjørdar av Biit, ungdómstoyminum í Kringvarpinum, og tað eru Anna Joensen-Næs og Bjørt Lind, sum leggja til rættis.

## Annað

Eins og sjónvarpið er útvarpið eisini til staðar á høgtíðardøgum. Bæði jól, páskir og ólavsøka er háárstíð hjá útvarpinum – og við tónleiki, konsertum og sendingum annars, ríkar útvarpið okkum høgtíðirnar.

Av nýggjum konsertum, sum útvarpið sendi á høgtíðardøgum í 2023, kunnu vit t.d. nevna Tarira og kamarkórið, Kristiliga sangkórið 70 ár og 40 ára jubileumskonsertina hjá Føroya Symfoniorkestri í samstarvi við Marius Ziska.



# Átrúnaður



# Meira enn 400 tímar við átrúnaði

Kringvarpið framleiðir nógv átrúnaðarligt tilfar til bæði sjónvarpið og útvarpið. Í 2023 kom tímatalið upp á 426 tímar. Í útvarpinum sendu vit 358 tímar og 68 tímar í sjónvarpinum.

Í 2023 var átrúnaðarliga økið dagført eitt sindur. Nýggja sendingin "Skrivað stendur" bleiv løgd afturat skránni, og eisini varð nýggjur leistur gjørdur fyri adventina, har Armgarð Arge hitti prestar í Føroyum at hugleiða um advent.

**Hetta heilaga evangeliið skrivar**

Sendingin verður send hvørt leygarkvøld kl. 17.45 og endursend sunnumorgun kl. 8.45. Ymsir prestar skriva til eitt kirkjuár í senn. Eitt kirkjuár byrjar og endar fyrsta sunnudag í advent.

Í ár skrivar Marjun í Kálvalíð, prestur.

**Morgunlestur**

Ymsir prestar hava skrivað morgunlestur, sum teir og leikfólk lesa.

**Sálmasavnið**

Enn manglar okkum at fáa nógvar nýggjar sálmaupptøkur í savnið, so vit kunnu siga, at vit hava eina dagførda sálmabók. Nógvir sálmar skulu syngjast inn og syngjast umaftur, tí ljóðgóðskan er ov vánalig, og tað tekur tíð. Men fólk brúka sálmasavnið og fegnast um, at so nógvir sálmar eru tøkir.

Í nógvum kirkjum hava tey ikki fastan urguleikara, og okkum er sagt, at tey hava okkara sálmar frá og syngja so við.

**Møti í útvarpinum**

Seks ferðir um árið senda vit evangelisk møtir hjá Brøðrasamkomuni. Vanliga verða tey send sunnudag kl. 17.00. Vit fáa tey sum lidna framleiðslu at senda.

**Ferðaliðið**

Ferðaliðið er toymið, sum tekur møti og gudstænastur upp hvønn sunnudag at verða send í sjónvarpinum. Síðani koronudagarnar hava vit hvønn sunnumorgun tekstað alla gudstænastuna og ofta eisini prædikuna hjá presti. Vit teksta sang/sálmar hjá fríkirkjunum.

**Gudstænastur í útvarpinum**

Vit royna at senda gudstænastur kring alt landið, har tað ber til. Í útvarpinum og sjónvarpinum senda vit somu gudstænastu beinleiðis. Allahalgannaaftan senda vit gudstænastu úr Dómkirkjuni beinleiðis í útvarpinum. Eisini senda vit, annan hvítusunnudag, uttandura gudstænastuna av ovara vølli í Gundadali í Havn.

**Nýggjársgudstænastan**

Gudstænastan nýggjársaftan og nýggjársdag var í Sands kirkju, har Havstein Klein, prestur, prædikaði. Oddfríður Marni Rasmussen las úr Prædikaranum.

Sandoyarkórið, undir leiðslu av Susanne Brattaberg, sang. Birna í Hjøllum Hentze og Hjørdis Jentoftsdóttir Thomsen sungu. Thomas Berg Thomsen spældi á klaver. Eisini sang Anna Lovisa Mýri, og Tummas Pauli Mýri spældi á klaver. Ólavur Olsen spældi trompet.

**Gudstænastur og møti**

Møtini og gudstænastur eru úr katólsku Mariukirkjuni, Hvítusunnusamkomuni, Kelduni, Oasuni, Adventistakirkjuni, Kirkjuliga Heimamissiónsfelagnum, Brøðrasamkomuni, Frelsunarherinum og Heimamissiónini.



**Andaktir í sjónvarpinum**

Andakt er hvørt sunnukvøld kl. 19.50. Ymsar samkomur og kirkjur skriva og lesa hesar andaktir. Á mishalgidøgum/hátíðum skriva og lesa prestar úr fólkakirkjuni. Hesar andaktir verða tiknar upp í ymsum kirkjum.

Í adventini royndu vit aftur annan "andaktsleist", har vit ein sunnudag prátaðu við Ann Hermansdóttir, studentaprest. Annan sunnudag í advent vóru vit á Kirkjuteigi í Kvívík og hittu Mariu Jørðdal Niclasen, prest, og ein sunnudag vóru vit í Vestmanna og prátaðu við Mariu Summers Nolsøe, prest.

**Credo**

Sendingin Credo verður nú send hvønn sunnudag kl. 14.15, har ljós verður varpað á lív og menniskju, teg og meg, etikk, filosofi og moral, kirkjur og samkomur, átrúnað her og úti, og prát við menniskju. Vertur er Armgarð Arge.

**Skrivað stendur**

Nýggja sendingin Skrivað stendur verður send fríggjamorgun kl. 11.00 og endursend sunnumorgun kl. 10.05.

Kári Sólstein og Armgarð Arge eru vertir í sendingini. Vit umrøða sunnudagsins prædikutekst, og lætt hevur verið at fáa fólk í útvarpsstovuna at práta um aldargomlu bíbliutekstirnar, sum tó eru dagsaktuellir. Vit hava lagt dent á at finna fólk, sum vit kenna úr almenna rúminum.

# Ungdómur



# Biit bítur víðari í nýggjum hami

**Stór útskifting í manning og leiðslu**

Biit, sum seinnu árini hevur ment seg nógv, helt fram, har ungdómstoymið slepti í 2022.

Eitt nú kunnu nevnast Gentuvesið, vikuligu Biit-sendingarnar, festivalsendingarnar, Hiit-sendingarnar og framleiðslan av Sement-kappingini.

Men eftir summarsteðgin var stór útskifting – bæði í manning og á brúnni.

Rólant Waag Dam, sum hevur umsitið ungdómsøkið seinastu árini sum redaktørur, er farin í annað starv, og eftir summarsteðgin fingu Finnur Koba og Kári Sólstein stafettina handaða.

Fleiri av berandi kreftunum, sum myndaðu ungdómstoymið farnu árini, eru eisini antin givin ella farin av landinum – eitt nú í lestrarørindum. Tað ávirkaði eisini skránna seinnu helvt av árinum.

Gentuvesið, sum er vorðið eitt akker í Biit-høpi, var í heyst einans sent hendinga ferðir, tá ið tær báðar Rannvør og Annika vóru heima í Føroyum.

**Súrligar nætur úr Keypmannahavn**

Hóast trý av undangongufólkunum seinnu árini – Rannvør Fríða Eyðunsdóttir, David Thomassen og Bárður Petersen – fluttu til Danmarkar, so hildu tey fram í Biit-høpi.

Tey fingu ein upptakara við sær í viðførið og hava í seinastuni hitst nakrar ferðir um mánaðin at taka upp, meðan tey tosa um tað, sum rørir seg í Føroyum og í Danmark. Sendingin kallast Súrligar nætur og verður send annaðhvørt vikuskifti.

**Kvøldvaktin sendir lurtaraynski**

Hvørt mikukvøld hevur útvarpsverturin Svend Danielsen trúfastur tendrað mikrofonina og sms-skipanina og tikið ímóti útvarpsynskjum. Sendingin "Kvøldvaktin", sum minnir um "Tit skriva, vit spæla", er ein ásannan av, at fleiri ung hava útvarpið tendrað um kvøldarnar. Á henda hátt røkka vit eisini teimum.

Sendingin er í 2024 flutt til sunnukvøld, sum er blivið eitt ungdómskvøld burturav.





**Beautyvarpið hittaði á netinum**

Pól Jóhannus Toftegaard Larsen gjørdist partur av Biit eftir summarfrítíðina. Hann og fotografurin Dina Fríða Poulsen fóru beinanvegin í holt við at framleiða Beautyvarpið, har hann saman við einum gesti tosar um smyrsl og um leyst og fast. Hóast partarnir einans hava verið tøkir á heimasíðuni hjá Kringvarpinum, so hava teir verið sera væl umtóktir. Hvør partur hevur fleiri enn 5.000 vitjanir. Á Facebook- og Instagram-vangunum hjá Kringvarpinum eru brotini við Beautyvarpinum millum tey mest sæddu. Oman fyri 20.000 fólk hava hugt at onkrum einstøkum broti á Instagram.

Væleydnaðu royndirnar við Beautyvarpinum á sosialu miðlunum hava givið redaktiónini eina fatan av, at í framtíðini fáa fleiri ungdómsframleiðslur pláss á talgildu pallunum heldur enn á siðvandu útvarps- og sjónvarpspallunum.

**Tveir ungdómsdokumentarar**

Sjónvarpið sendi í heyst tveir dokumentarar, sum Biit hevði framleitt.

Tann fyrri, Ein annar veruleiki, snýr seg um Angel Nashami. Hon hevur búð í Føroyum í átta ár og vitjar í heimlandinum, Kenja. Við á ferðini er vinkonan Anna Joensen-Næs, sum hevur gjørt filmin.

Tann seinni, Stórur maður í Voxbotni, snýr seg um rapparan Marius DC, sum hevði eina heilt serliga uppliving á Voxbotn-festivalinum, har hann endaði við at syngja saman við einari stórari fyrimynd. Petur Sigurð í Króki hevur filmað og lagt filmin til rættis.

# Børn



# Føroyskt til okkara smáu

VIT er á tremur við føroyskum og føroyskt mæltum tilfari til børnini.

Barnaøkið í Kringvarpinum hevur høga raðfesting, og stórur dentur verður lagdur á at menna økið og framleiða nýtt føroyskt tilfar. Hetta er alneyðugt í eini tíð, har ein vaksandi nøgd av útlendskum tilfari er tøk hjá yngstu ættarliðunum.



Í 2023 varð eitt starvsfólk lagt afturat hópinum á barnaøkinum, sum millum annað skal vera við til at framleiða og samskipa tilfar til talgildu pallarnar. Nógv føroyskt tilfar varð framleitt í 2023, og eisini vórðu fleiri útlendskar røðir keyptar, sum skulu týðast og ljóðsetast í 2024. Eitt nú kunnu børnini gleða seg til, at nærum 100 partar av Mumi verða tøkir í VIT-appini og á kvf.fo.

Niðanfyri eru nakrar av framleiðslunum í 2023 lýstar.

### Nýggjar røðir í barnasjónvarpinum

Sløkki-Sam er væl kend røð, sum børnini kenna frá øðrum rásum. Men nú tosa tey í Sløkki-Sam føroyskt. Sam er ein djarvur sløkkiliðsmaður, sum saman við hinum sløkkiliðsmonnunum í Puntabøi bjargar teimum, sum koma í vanda. 26 partar vórðu framleiddir til føroyskt á vári 2023, og 1. partur var í Snipp Snapp á heysti 2023.

Nýggir partar av Grísa-Peppu vóru eisini í Snipp Snapp – um fitta, lítla 4 ára gamla grísin. Heima hjá teimum búgva grísamamma, grísapápi, Peppa og lítlibeiggin George.

“Smábørn” er røð við føroyskari talu til tey allarsmæstu. 10 partar vórðu settir á skrá við fílinum og smábørnunum, sum forvitnast. Og nú ber til hjá børnunum at síggja hesar røðir í VIT-appini.

### Sakin

Sakin var sera væl umtókt og var á skránni fríggjakvøld á vári 2023. Her varð borðreitt við nógvum spennandi, stuttligum og øðrvísi evnum. Nógv varð gjørt burtur úr grafikki, tí myndliga og tí skemtingarsama. Innsløgini vóru ymisk, og børn kring landið sluppu til orðanna at vísa síni kynstur ella greiða frá hugtakandi søgum. Við “degnum í dag” fingu vit nýggja vitan borðreidda við góðum grafikki. Petursa borð var eisini fjølbroytt við tónleiki, skemtisøgum og áhugaverdum evnum.

### Hvør veit?

Seinasta vár vóru 3. flokkar í skúlunum kring landið í Kringvarpinum og tóku upp til spurnakappingina “Hvør veit?” Hetta er undirhaldssending fyri børn við spurningum og kappingum. Her vóru fýra umfør, og nøkur børn vóru á pallinum og umboðaðu flokkin, meðan tey, ið sita á áskoðaraplássunum, stuðlaðu floksfeløgunum. Tíggju sendingar vórðu framleiddar og sendar á heysti 2023.

### Luka og leikhúsið

Sjónvarpsjólakalendarin í Kringvarpinum kallaðist Luka og leikhúsið. Ein sera góður og viðkomandi jólakalendari, har alt møguligt spennandi og gott hendir. Leikurin er upprunaliga norskur, og 35 leikarar løgdu føroyskar røddir á – 21 vaksin og 14 børn í aldrinum 8 til 15 ár.

Jólaboðskapurin í hesi søguni er, at lívið er ikki ein kampur, og lívið snýr seg ikki um at vinna og tapa – ongum nýtist at tapa.

### Ljóðmyndir og útvarpsleikir

Í tveimum umførum hava vit sent røðina um Elvin Griff, sum er rýmdur frá einum loyniligum agent-skúla, og nú er hann eftirlýstur. Tí má Elvin vekk. Langt vekk. Á vegnum møtir hann happarum, óndum vaksnum og Lýdiu, sum hevur síni egnu loyndarmál. Men eingin av teimum veit, at Elvin Griff hevur nakrar heilt serligar eginleikar.

Útvarpsleikurin “Klótuklubbin” var samstarv við børn og lærarar í skúlanum við Løkin, Elin á Rógvi var leikstjóri og upplesari, og tey vóru leikarar. “Klótu-klubbin” er ein detektivstova, sum tekur sær av málum, ið hava við umhvørvi og veðurlag at gera.



### Sangur og tónleikur

Vit leggja dent á at varpa ljós á barnasangir, nýggjar útgávur og hoyra søgur um sangir. Eitt nú um nýggju sangirnar hjá Túsund smílum, um Nósafløguna, sum hevði 40 ára føðingardag og um Reiley, sum var við í Eurovision í Liverpool.

### Ítróttastjørnur

Í Føroyum hava vit fleiri ítróttastjørnur. Tá ið vit byrjaðu nýggju vetrarskránna á heysti 2023, løgdu vit fyri við at hoyra um nakrar av teimum. Við eru: Árni Fredriksberg, Ísak Vedelsbøl, Sarah Mahfoud, Jónas Isaksen og Astrið Nanly Breckmann.

### Hvussu er jørðin uppbygd?

Í eina viku tosaði Uni Árting um, hvussu jørðin er uppbygd. Og við hesum stóra spurningi fingu vit fleiri afturmeldingar frá skúlum kring landið, sum hava brúkt sendingarnar í undirvísingini.

### Barnaútvarpið á ferð

Vit ferðast kring landið við mikrofonini til viðkomandi tiltøk. Børn senda okkum brøv, og vit gleðast um at hoyra teirra søgur. Í tveimum sendingum hoyrdu vit børn, sum búgva í Nuuk, greiða frá.










# Og so eitt heilt serligt tilboð: VIT er ein app!

**Stórtíðindi til børn í Føroyum**

Í juni í 2023 varð nýggja VIT-appin almannakunngjørd. VIT-appin er stórt frambrot á barnaøkinum, og børn og foreldur gleddust saman við okkum um, at appin sá dagsins ljós, og at fjølbroytta sjónvarpstilfarið til børnini nú var lættari atkomuligt.

Ein rúgva av tilfari er at finna í appini. Fyri bara at nevna nøkur dømi, kunnu børnini hugna sær við omanfyrinevndu Grísa Peppu, Sløkki-Sam og øðrum útlendskum røðum við føroyskari talu – ella føroyskum framleiðslum sum Sakin, Látiløtan og Angela og Hannibal.

**Umráðandi, at føroysk børn hyggja at føroyskum tilfari**

– Kringvarpið hevur í mong ár lagt dent á at hava gott tilfar til børn og ung. Men tað, at vit nú kunnu gera barnatilfar lættari atkomuligt á einum palli, sum børnini brúka nógv, hevur stóran týdning. Vit liva í eini tíð, har útlendska tilfarið og enska málið vinnur alt meira fram og troðkar tað føroyska til viks. Tí er tað so umráðandi, at børn og ung skulu kunna kenna seg aftur í einum føroyskum veruleika. Sum public service-stovnur vóna vit, at appin fer at hava jaliga ávirkan á máltilvitið hjá børnunum, sigur Ivan Hentze Niclasen, kringvarpsstjóri.

**Brúkaravinarlig og atkomulig**

VIT-appin kann takast niður í Google Play Store (Android) og í App Store (iOS). Appin er í fyrstu syftu sniðgjørd til telefon og teldil og er ókeypis at taka niður. Appin hevur Chromecast-funku.

Fyribils er sjónvarpstilfarið til børn tøkt í appini, men arbeitt verður við at gera útvarpstilfarið tøkt eisini. Til tá eru nógvu tímarnir av barnaútvarpi og søgum framvegis tøkir á heimasíðuni og í poddvarpsappum.

Tilfarið í appini er bólkað soleiðis, at tað er lætt at finna runt í henni. Eisini minnist appin, hvørjum tú hevur hugt at seinast. Yndisrøðir liggja ovast, so tú kanst hyggja víðari, tá ið tú letur upp eina aðru ferð. Eldri sendingar og røðir liggja eisini í appini, og tilfarið verður javnan skift út, so børnini hava okkurt at gleða seg til.

# Tónleikur



# Føroyski tónleikurin í útvarpinum táttar í 60 %



Sambært uppgerð frá sendiskipanini spældi útvarpið 77.783 sangir í 2023. Av hesum vóru 46.243 føroyskir, og tað merkir, at góð 59 % av tónleikinum í útvarpinum í 2023 var føroyskur.

Tónleikaredaktiónin í útvarpinum hevði vikuligar fundir, har nýggjur tónleikur varð spældur og viðgjørdur, áðrenn hann varð settur í umferð.

Tilsamans vóru 195 nýggir føroyskir sangir við 115 ymiskum tónleikanøvnum settir í umferð í útvarpinum í 2023, og tað er nýtt met.

Uppskotini komu frá tónleikarum, plátufeløgum, lurtarum hjá útvarpinum og starvsfólkum hjá KVF.

**Spæl føroyskt-vika**

Spæl føroyskt-vika var frá 5. til 12. mars, og tá varð einans føroyskur tónleikur spældur í øllum frumsendingum, á náttarrásini og rundan um sendingar annars í útvarpinum.

**Ársins útvarpshitt**

Ársins útvarpshitt varð valt av lurtarunum hjá Kringvarpinum í Spæl føroyskt-vikuni. Atkvøðugreiðslan gekk fyri seg á kvf.fo. Lurtararnir valdu sangin “Send mær meira pengar” við bólkinum RSP at vera Ársins útvarpshitt í farna árinum 2023.

**Faroese Music Awards 10 ár**

FMA varð sent fyri tíggjundu ferð tann 11. mars, og fyri fyrstu ferð var Tónleikasamband Føroya høvuðsfyriskipari saman við Norðurlandahúsinum og Kringvarpinum.

Tónleikasamband Føroya, ið varð stovnað í 2022, tók sær serliga av tí innihaldsliga partinum við heiðurslønum og tónleikaframførslum.

Talan var um beinleiðis sjónvarpssending úr Norðurlandahúsinum, har føroyskur tónleikur varð fagnaður við framførslum og virðislønum.

Eisini vórðu fleiri bandað innsløg gjørd til sjálva sendingina, har tónleikarar vórðu tiknir á bóli við virðislønum.

Í alt vórðu 9 heiðurslønir latnar fyri framúr avrik á føroyska tónleikaøkinum á FMA í 2023.

**Í luftini**

Eitt umfar av tónleikarøðini “Í luftini” varð tikið upp og sent í 2023.

“Í luftini” er samstarv við FMX (Faroese Music Export) og verður sent í sjónvarpinum. “Í luftini” varð fyrstu ferð sent í 2020. Tá bleiv alt, tónleikur og samrøður, tikið upp í Kringvarpshøllini.

Hesa ferð varð farið út úr útvarpsstovuni at gera samrøðurnar, meðan tónleikurin enn sum áður varð tikin upp í kringvarpshøllini.

**Sement-finalan beinleiðis í sjónvarpinum**

Eins og undanfarin ár sendu vit frá Sement-tónleikakappingini á Reinsarínum í 2023. Tað vóru fólk frá ungdómstoyminum Biit, sum stóðu fyri framleiðsluni, og tað bleiv sent frá bæði innleiðandi umførunum og finaluni.







**Eurovision**

Fyri fyrstu ferð í søguni luttók ein føroyskur sangari og sangskrivari í altjóða Eurovision-sangkappingini, sum varð hildin í Liverpool í døgunum 9. til 13. mai.

Rani Petersen úr Havn, við pallnavninum Reiley, umboðaði Danmark í Eurovision-sangkappingini, aftan á at hann hevði vunnið donsku Melodi Grand Prix-sangkappingina, sum var hildin í Næstved tann 11. februar.

Kringvarpið var á staðnum og sendi hesa vikuna beinleiðis morgunútvarp úr Liverpool og framleiddi innsløg til heimasíðuna og tíðindasendingar í útvarpi og sjónvarpi hjá KVF.

Høvið varð eisini nýtt til at skapa sambond og kanna møguleikan fyri føroyskum limaskapi í EBU. Á skránni vóru óformellir fundir við nevndarlimir í EBU og Eurovision. Málið er, at føroyingar einaferð í framtíðini fara at umboða Føroyar í Eurovision.

**Nýggjárskonsertin**

Kringvarpið sendi nýggjárskonsertina hjá Føroya Symfoniorkestri í Norðurlandahúsinum beinleiðis í sjónvarpinum.

Á konsertini við Føroya Symfoniorkestri og kóri luttóku Herfinnur Árnafjall, baritonsolistur, Hanne Marit Mordal Iversen, sopransolistur og Aksel Remmel, klaversolistur.

**Konsertupptøkur í sjónvarpinum**

Ein rúgva av konsertupptøkum vórðu sendar í sjónvarpinum í 2023 – m.a. konsert við Mariusi Ziska og Føroya Symfoniorkestri, nýggjárskonsertin, Faroese Music Awards (FMA), frá Sement-kappingini, fýra "Í luftini-konsertir", útgávukonsertir, Jól við Løkin og beinleiðis konsert við Anniku Hoydal í Sirkus.

Sjónvarpið sendi javnan nýggj og eldri videoløg sum millumsendingar.

**Vikuligu tónleikasendingarnar í útvarpinum í 2023**

Vikuligu tónleikasendingarnar í útvarpinum eru smalar, men okkurt er fyri øll – poppur, klassiskur tónleikur, jazz, andaligur tónleikur, tónleikaummæli, nýggjur og gamal tónleikur, kvæði, rokkur, dansibandstónleikur o.m.a.

Harumframt vóru eisini aðrar stakar tónleikasendingar gjørdar í sambandi við høgtíðir og merkisdagar.

Tónleikasamskipari: Eyðfinn Jensen

# SAVNS GULL

## Kringvarpssavnið er talgildað og bjargað fyri eftirtíðina

Fyrsti parturin av verkætlanini Savnsgull er komin á mál. Alt kringvarpssavnið er talgildað og bjargað fyri eftirtíðina og liggur nú á goymslu í Kringvarpinum. Tey ásettu tíggju árini eru farin, og vit eru komin á mál við fyrsta partinum av verkætlanini.

Nú kunnu vit í Kringvarpinum lætt og ómakaleyst hoyra alt, sum er varðveitt frá fyrsta degi, ið sent varð í Útvarpi Føroya 6. februar 1957, og síggja fyrstu sending úr Sjónvarpi Føroya, ið varð send fyri 40 árum síðani.

Oman fyri 40 fólk hava arbeitt í Savnsgulli. Umframt starvsfólk, ið eru sett eftir vanligum treytum, er eitt stórt tilfeingi komið úr Almannaverkinum, har starvsfólk í tillagaðum starvi og í arbeiðsroynd hava verið ein týdningarmikil partur av verkætlanini.

Á ólavsøku 2023 var fyrsti parturin av verkætlanini liðugur.

Fyrireikingarnar at gera savnið atkomuligt fyri Føroya fólki er farin í gongd. Ætlan, hvussu arbeiðið skal fara fram, er gjørd. Arbeiðið krevur nú eina raðfesting frá politisku skipanini, soleiðis at okkara mentanararvur kann verða ein livandi partur av okkara gerandisdegi.

# Public service



# Umfatandi sparingar raktu skránna meint

Tann 14. november var boðað frá stórum sparingum í Kringvarpinum. Stovnurin minkaði um starvsfólkahópin við útivið 11 ársverkum. Kringvarpsstjórin segði í tí sambandi, at sparingarnar fóru at raka skránna meint. Politiski myndugleikin boðaði knappar tvær vikur seinni frá, at eitt lógaruppskot var á veg í Løgtingið, sum bøtti um inntøkugrundarlagið hjá Kringvarpinum. Uppsagnirnar í fasta starvsfólkahópinum vóru tí tiknar aftur. Fráboðaða lógaruppskotið fór tó ikki at geva allar tær inntøkurnar, sum tørvur var á, og tí stóðu flestu sparingarnar í rakstrinum og skránni við. Í roynd og veru var Kringvarpið sett í eina bíðistøðu, inntil greiða fekst á, hvørja lagnu lógaruppskotið fekk.

Tað mesta av 2023 hevði leiðslan í Kringvarpinum bíðað eftir, at landsstýrið fór at gera álvara av orðingini í samgonguskjalinum um, at Kringvarpið skuldi styrkjast. Í august og september greiddi leiðslan á fundum við landsstýrið frá, hvørjar avleiðingar tað hevði, at játtanin til stovnin – kringvarpsgjaldið – stóð í stað, samstundis sum útreiðslurnar, ið stóðust av lønarvøkstri og príshækkingum, alsamt vuksu.

Tann 14. november sá leiðslan seg noydda at taka stig til sparingar. Framrokningar vístu, at raksturin í 2024 fór at geva eitt hall á stívliga 8 mió. kr. Kringvarpsstjórin, Ivan Hentze Niclasen, vísti á, at undirskotið fór at vaksa skjótt næstu árini, um Kringvarpið ikki framdi sparingarnar.

### Skráin tódnaði

Umfatandi sparingarnar raktu skránna meint. Framleiðslan av føroyskum tilfari bleiv skerd. Talið av stórum sjónvarpsframleiðslum minkaði. Beinanvegin bleiv boðað frá, at stóra sjónvarpsframleiðslan av nýggjárskonsertini í januar 2024 bleiv strikað, eins og aðrar stórar framleiðslur á ítrótta- og mentanarøkinum blivu skornar burtur ella skerdar.

Minni orka bleiv sett av til aktualitetssendingina Breddan, sum einans fór at verða send tríggjar ferðir um vikuna. Talið av tíðindasendingum í útvarpinum skuldi minkast. Eftir ætlan skuldu tíðindasendingarnar í útvarpinum seinnapartar detta burtur.

Lagt var upp til, at færri tónleika- og mentanarsendingar skuldu setast á skrá í útvarpinum. Talið av sjónvarpsdokumentarum skuldi minka – úr umleið 40 árliga – til umleið 25 dokumentarar árliga. Nýggi jólakalendarin, sum skuldi skrivast til barnaútvarpið, var fyribils av ongum.

### Orsøkir til sparingarnar

Játtanin til stovnin – kringvarpsgjaldið – hevur staðið í stað síðani 2016. Nýggjar fólkatalsframrokningar vístu, at inntøkurnar frá kringvarpsgjaldi fóru at standa í stað komandi 10 árini. Einki bendi á, at aðrar inntøkur komu at viga upp ímóti, at inntøkurnar frá kringvarpsgjaldinum frameftir stóðu í stað.



Samstundis vóru ikki útlit til, at inntøkurnar frá gekkaspælinum megnaðu at bøta vaksandi útreiðslurnar. Tí kom leiðslan til ta niðurstøðu, at fíggjarliga grundarlagið undir stovninum ridlaði av álvara.

Ivan Hentze Niclasen vísti á, at Kringvarpið er í eini serstøðu sum almennur stovnur, tí stovnurin fær ikki kompensatión fyri útreiðsluvøksturin í samfelagnum:

"Tá ið kringvarpsgjaldið stendur í stað, sigur tað seg sjálvt, at vit kunnu ikki standa ímóti, tá ið lønir og prísir vaksa. Tí má Kringvarpið alla tíðina niðurlaga virksemið fyri at hava javnvág millum inntøkur og útreiðslur," segði hann.

### Tørvur á einum sterkum Kringvarpi

Hetta var aðru ferð í bert tvey ár, at Kringvarpið boðaði frá umfatandi sparingum. Í 2021 spardi stovnurin stívliga 6 mió. kr. Tá vórðu knappliga sjey ársverk spard burtur.

Kringvarpsstjórin fanst hvassliga at gongdini seinnu árini.

"Mentanarpolitiskt vendir hetta púra skeivt. Vit liva í eini tíð við nógvum rembingum, og tá er stórur tørvur á sterkum public service-stovnum, sum kunnu varpa álítandi tíðindi. Tí er brúk fyri einum sterkum Kringvarpi. Samstundis sum vit skerja okkara virksemi, floyma ovurstórar nøgdir av útlendskum films- og sjónvarpstilfari inn yvir okkum frá stóru, altjóða stroymingartænastunum. Tað ávirkar málførið og mentanina, og tí er alneyðugt at framleiða enn meira dygdargott tilfar á móðurmálinum til børn og ung og at kunna varpa enn fleiri mentanarsendingar," segði Ivan Hentze Niclasen.

### Uppskot um loysnir

Í desember var komið væl ávegis í tilgongdini at leggja lógaruppskotið um kringvarpsgjaldið fyri Løgtingið. Kringvarpið vísti í hoyringarsvarinum til lógaruppskotið á, at um stovnurin veruliga skuldi framtíðartryggjast, so var neyðugt at lække aldurin hjá teimum, sum rinda kringvarpsgjald, úr 24 ár niður í 18 ár. Harnæst var mælt til, at prístalsjavningin – í staðin fyri at vera 2 prosent – skuldi fylgja gongdini í prís- og lønarstøðinum. Fyri tað triðja bleiv skotið upp, at ætlaða minkingin í kringvarpsgjaldinum frá smærri virkjum og stovnum var kompenserað við størri gjaldi frá størru virkjunum og stovnunum. At enda ynskti Kringvarpið eisini, at kringvarpsgjaldið frá virkjum og stovnum bleiv prístalsjavnað.

# Ætlan um talgilding er grundarlagið undir nýskipanum



Leiðslan fór í 2022 undir at orða eina ætlan, sum legði dent á at skapa ein nýmótans og streymlinjaðan stovn, sum við samvirkandi talgildum arbeiðsgongdum fær mest virði burtur úr kringvarpsgjaldinum og harvið gevur føroyingum atgongd til meira føroyskt innihald.

Miðlavanar og tøkni broytast alla tíðina, og tí er alneyðugt, at Kringvarpið fremur nýskipanir, soleiðis at stovnurin framhaldandi varðveitir og styrkir sína støðu sum fremsti og mest viðkomandi miðilin hjá føroyingum. Nýskipanirnar verða framdar á samvirkandi økjum, har tøkni, arbeiðsgongdir og framleiðsla av innihaldi saman skulu gera stovnin føran fyri at taka við avbjóðingunum í tíðini.

Óvissan um fíggjarstøðuna í 2023 seinkaði tilgongdina nakað, tí leiðslan noyddist at arbeiða við sparingum. Tó varð endalig avgerð tikin um at skifta stórar partar av kritiska undirstøðukervinum undir bæði útvarpi og sjónvarpi út. Dalet-skipanin, sum hevur verið bulurin undir útvarpsframleiðsluni, verður skift út við RadioMan-skipanina. Hetta gevur stórar og heilt nýggjar møguleikar. Nýggja skipanin er smidligari og gevur betri møguleikar at virka sum grundskipan til savnið og fer at virka sum sambindingarlið millum framleiðslu, savn og heimasíðu.

Verksetingin av RadioMan-skipanini verður framd fyrra hálvár 2024 og fer væntandi at vara 2-3 ár fram.

Arbeiðið við at seta í verk nýggju MAM-skipanina til sjónvarpsframleiðslu og savn byrjaði í 2023. Arbeiðið er sera umfatandi. Eins og fyri útvarp skal skipanin menna samvirkandi arbeiðsgongdir og vera snúningsdepilin í sambandi við sjónvarpsframleiðsluna, savnið og heimasíðuna. Arbeiðið við at menna og skipa arbeiðsgongdir til hesa skipanina er í gongd og fer at taka nøkur ár.

**Strategisku málini**

Hesar avgerandi broytingarnar á tøkniøkinum gera tað møguligt at røkka yvirskipaða málinum í talgildu strategiini. At alt programmvirksemið lagar seg til at veita bestu talgildu tænastuna.

Orsøkin er einføld: Alneyðugt er, at vit kennast viðkomandi fyri allar bólkar og skapa virðir fyri øll.

Til tess at røkka málinum er neyðugt, at tilgongdin hevur broytingar við sær í arbeiðsgongdum, innihaldi og tænastum.

Stevnumiðið er at styrkja um kappingarførið í einum heimi við alsamt broyttum miðlavanum.

Endamálið er, at Kringvarpið er fremst millum miðlar, ið veita føroyingunum tað tilfar, tey vilja hava, á tann hátt, ið hóskar teimum best.

# Miðlar og fólkaræði

## – ein ráðstevna um avbjóðingar og loysnir fyri ábyrgdarfullar miðlar í talgilda meldrinum

Kringvarpið skipaði á triðja sinni fyri ráðstevnu um avbjóðingar og loysnir í miðlaheiminum.

Ráðstevnan varð hildin 1. september í Norðurlandahúsinum.

Eyðvitað er, at ábyrgdarfullir tíðindamiðlar hava stóran týdning fyri fólkaræðið. Men miðlarnir eru undir vaksandi trýsti. Minkandi inntøkur og vaksandi útreiðslur skapa nýggjar avbjóðingar fyri miðlalandslagið, sum stríðist við at finna loysnir. Afturat hesum hevur nýggi alheimsgjørdi miðlaveruleikin aðrar avbjóðingar við sær, sum gera tað neyðugt at hava eftirlit við tøknirisunum.

Tøknirisarnir hava broytt mátan, vit fáa atgongd til kunning, hvussu vit samskifta, og hvussu vit koma saman í felagsskapir. Hetta hevur havt við sær fullkomiliga broyttar miðlavanar og eitt miðlalandslag, sum verður alt meira sundurpettað. Ein avleiðing av hesum er, at eyðkendi føroyski miðlavangin, sum setur karmar fyri fólkaræðisligu samrøðuna, viknar.

Ráðstevnan setti sjóneykuna á føroyska miðlalandslagið og týdning tess í einum samfelagi, har álítandi, kritiskir miðlar og eitt haldgott fólkaræði eru fyritreytir hvør hjá øðrum.

Vit spurdu, hvussu ábyrgdarfullir miðlar kunnu varðveita og styrkja sín leiklut í 2023. Hvussu varðveita miðlarnir fólkaræðisliga kjakið? Hvønn leiklut hava miðlarnir, tá ið tað kemur til at varðveita savningarmegina og í at stimbra mentan og tjóðarsamleika í Føroyum? Hvat verður viðmælt altjóða, og hvørji politisk tiltøk verða umrødd? Hvat kunnu føroyskir politikarar gera?

Útlendskir og føroyskir miðlaserfrøðingar og politikarar settu miðlagongdina í Føroyum og virksemið hjá tøknirisunum í frásjón.



### Hesi løgdu fram og vóru við í pallborðskjaki

- Jákup Brúsá, Digital Marketing Consultants
- Nick Couldry, professari, London School of Economics and Political Science
- Sofie Flensburg, adjunktur, Københavns Universitet
- Mikkel Flyverbom, professari, Copenhagen Business School
- Jan Lamhauge, journalistur, Frihedsbrevet.fo
- Jón Brian Hvidtfeldt, formaður, Felagið føroysk miðlafólk
- Jóhannis Joensen, Løgtingsins mentanarnevnd
- Bárður á Lakjuni, Løgtingsins mentanarnevnd
- Eirikur Lindenskov, stjóri, Sosialurin
- Sólvit Nolsøe, formaður, Løgtingsins mentanarnevnd
- Rógvi Olavson, formaður, kringvarpsstýrið
- Magnus Rasmussen, Løgtingsins mentanarnevnd
- Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum
- Liljan Weihe, Løgtingsins mentanarnevnd

# Nýtt kringvarpsstýri



Í mars 2023 mannaði Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í mentamálum, nýggja kringvarpsstýrið. Kringvarpsstýrið er ovasta leiðslan í Kringvarpinum og hevur ábyrgdina av, at stovnurin virkar eftir ásetingunum í kringvarpslógini og í øðrum fyriskipanum um virksemið á stovninum.

Kringvarpsstýrið verður valt fyri fýra ár í senn. Landsstýrisfólkið í mentamálum velur formann og næstformann. Eftir tilmæli frá politisku flokkunum og starvsfólkunum í Kringvarpinum tilnevnir landsstýrisfólkið hinar fimm stýrislimirnar.

Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í mentamálum, setti nýggja kringvarpsstýrið tann 1. mars 2023.

## Føstu limirnir í stýrinum eru hesir

**Rógvi Olavson, formaður,**
**eftir tilmæli frá politisku flokkunum**

Rógvi er Ph.d.-lesandi í politiskum vísindum á Fróðskaparsetri Føroya. Seinastu árini hevur hann staðið fyri skeiðnum “Miðlar og politiskt samskifti” á Søgu- og samfelagsdeildini. Hann hevur fyrr millum annað starvast sum journalistur í Kringvarpi Føroya, sum undirvísari á Fróðskaparsetri Føroya og sum fulltrúi á Løgmansskrivstovuni.

**Mathea Hilduberg, næstforkvinna,**
**tilnevnd beinleiðis av landsstýriskvinnuni**

Mathea er leiðari í Vinnuframa. Hon hevur m.a. starvast í Bikuben í Keypmannahavn, Eik Banka og hjá Føroya Tele og hevur drúgvar royndir við nevndararbeiði í P/F Vágatunnilin, P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnilin, Landsbanka Føroya og P/F Greengate Incoming.

**Høgni Reistrup,**
**tilnevndur beinleiðis av landsstýriskvinnuni**

Høgni er stjóri í fyritøkuni Guide to Faroe Islands. Hann er útbúgvin cand.mag. í miðlavísindum frá lærda háskúlanum í Keypmannahavn og Dublin City University.

**Annika Eidesgaard,**
**eftir tilmæli frá politisku flokkunum**

Annika starvast sum lærari í Tvøroyrar skúla, har hon hevur verið í starvi síðan 2007. Hon er útbúgvin fólkaskúlalærari.

**Michael Koba,**
**eftir tilmæli frá politisku flokkunum**

Michael er filmsframleiðari í KOVBOY FILM og rekur JUST DRIVE-bilútleigan. Hann hevur útbúgving í Hotel Management.

**Gunvá við Keldu,**
**eftir tilmæli frá politisku flokkunum**

Gunvá við Keldu er virkiseigari av Estra/Vasti í Gøtu og Grafia í Klaksvík og er útbúgvin miðlagrafikari og grafonomur frá Danmarks medie- og journalisthøjskole.

Gunvá hevur verið býráðslimur í Klaksvíkar býráði síðani 2005 og borgarstjóri í Klaksvík árini 2009-2012.

**Finnur Koba,**
**starvsfólkaumboð**

Finnur Koba er valdur at umboða starvsfólkini í Kringvarpi Føroya. Hann hevur verið í føstum starvi á stovninum síðani 2012. Tey fyrstu árini á Aktuelt og seinnu árini á Mentan.

Finnur er bachelor í miðlafrøði frá Aarhus Universiteti.

Les meira um kringvarpsstýrið her.

KRINGVARP
FØROYA